## Kríggið miseydnað

Danmark misti aftur ein hermann í Afghanistan í gjár. Tað var ein 23 ára gamal maður, sum doyði av einari spreinging, og sostatt hevur Danmark nú mist 28 hermenn í krígnum. Samstundis endurgevur Berlingske Tidende eina nýggja amerikanska fregnartænastufrágreiðing, sum sáar iva um sjálvt grundarlagið fyri krígsførsluni. Frágreiðingin sigur, at Taliban og al Qaeda eru ikki høvuðsfíggindin longur, men at tað eru mótstøðufólk, sum vilja hava tað útlendska hersetingarvaldið av landinum.



## Obama lovar skerjing

Tá Barack Obama, forseti, kemur til Keypmannahavnar tann 9. desember, fer hann at boða frá, at innan 2020 fer USA at skerja sítt CO2-útlát 17 prosent samanborið við útlátið í 2005. Harafturat fer USA at skjóta upp at skerja útlátið 30 prosent innan 2025 og 42 prosent innan 2030. Málið hjá Obama-stjórnini er at skerja útlátið 83 prosent innan 2050. ES hevur leingi lagt trýst á USA og Kina fyri at fáa londini at koma við beinleiðis uppskotum um, hvussu nógv og hvussu skjótt tey ætla at skerja sítt CO2-útlát.




*Mikael Wivel við stóru nýggju bókini um Ingálv av Reyni, ið er útkomin í dag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ingálvur á trimum málum

**Listasavn Føroya hevur í dag givið nýggja, altjóða bók út um listamannin Ingálv av Reyni og verk hansara. Danin Mikael Wivel hevur skrivað bókina**

BÓKAÚTGÁVA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein av størstu listamonnum Føroya, Ingálv av Reyni, hevur í dag fingið sítt pláss í einari størari altjóða bók. Bókin, sum inniheldur mestsum øll listaverk hansara, líka frá fyrstu, intimu málningunum av familju og húsum, har hann búleikaðist, til teir seinastu, stóru og dapru málningarnar, er útgivin av Listasavni Føroya.

Tað er danin Mikael Wivel, sum hevur skrivað bókina, og í somu bók stendur allur teksturin á føroyskum, donskum og enskum. Talan er sostatt um eina altjóða bók.

Fyri tulkingina av Ingálvi av Reyni, heldur Mikael Wivel sjálvur at tað er sera gevandi, at hann er ein dani, sum kemur uttanífrá og hyggur upp á hann við donskum og altjóða eygum.

- Hetta er besta boðið, Føroyar hava upp á ein altjóða stórmálara. Hann var á ein hátt ein paradoksalur maður. Eg havi sæð filmin um hann, har hann gongur á gøtunum í Havn og heilsar upp á fólk, lyftir keppin av og heilsar blídliga. Hann syngur eisini í Brøðrasamkomuni, og hevur eina milda rødd. Hann er har ein øgiliga mildur maður. Men má hann so kemur heim, málar hann upp á ein brutalan máta, og »oyðileggur« vøkur ting. Hann sigur, at »tað má ikki verða for vakurt«, greiðir Mikael Wivel frá.

### Stórur dagur í Listaskálanum

Í samband við at bókin um Ingálv av Reyni verður givin út, letur eisini ein listaframsýning við málningum hjá honum upp í Listaskálanum. Ingálvur av Reyni málaði nógv, og er talan um eina stóra framsýning.

Helgi Fossádal greiðir frá, at hetta er ein stórur dagur í Listaskálanum, tí í samband við framsýningina, er tað fyrsta ferð, síðan Listaskálin lat upp, at høvuðsverkið hjá Mikines er flutt úr »pyramiduni«, og nú er tað Ingálvur, sum hevur sítt pláss har.

Málningarnir hjá Ingálvi fylla tað mesta av Listaskálanum, og umframt hansara verk hanga eisini listaverk hjá millum annað Mikines, Ruth Smith og øðrum, sum hann í síni tíð eisini hevur arbeitt saman við.

Listaframsýningin er opin í Listaskálanum inntil 1. mars, tá framsýningin fer niður til Danmarkar.

## Kapping um oljuprísirnar

**Herfyri bjóðaði Effo bíligari brennievni til bilar enn Magn í ein dag. Tveir dagarnar í hesari vikuni hevur Magn svarað aftur við bíligari gassolju**

BRENNIEVNI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað tykist sum, at kapping hevur tikið seg upp á marknaðinum um brennievni. Seinastu nógvu árini hava prísirnir hjá kappingarneytunum í Føroyum, Shell og Statoil, sum tey tá itu, verið at kalla júst teir somu, og prísirnir eru hækkaðir og lækkaðir samstundis.

Herfyri kom Effo tó við einum opningstilboði, tá teir í ein heilan dag seldu bensin og diesel eina krónu bíligari fyri liturin enn Magn.

Nú hevur Magn svarað aftur. Mánadagin og týsdagin hevur Magn selt gassolju fyri 5,31 krónur, meðan prísurin hjá Effo hevur verið 5,56 krónur fyri liturin av gassolju. Fyri ein tanga á 1000 litrar er hetta ein munur á 200 krónur.

Í gjár hevur Effo tó eisini lækkað prísin niður á 5,31 krónur fyri liturin av gassolju, og er kostnaðurin sostatt aftur tann sami hjá báðum útbjóðarunum.

Hetta kundi bent á, at ein lítil kapping er við at taka seg upp á marknaðinum, og at prísirnir ikki neyðturviliga fylgjast líka kroniskt hjá báðum útbjóðarunum, sum teir higartil hava.

## Vilja hava kirkjugarðspark í Sandavági

**Á kunnandi fundi um nýggjan kirkjugarð í Sandavági týskvøldið, vóru seks uppskot løgd fram. Størstur áhugi var fyri at gera eina kirkjugarðspark fyri 7,5 milliónir krónur**

BYGGING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Á kunnandi fundi um nýggjan kirkjugarð í Sandavági, sum hildin varð í SÍF húsinum týskvøldið, vóru seks ymisk uppskot løgd fram. Størstur áhugi tóktist vera fyri uppskotinum at gera eina sonevnda kirkjugarðspark úti á Bakka.

Av teimum seks uppskotinum, sum vórðu løgd fram, var uppskotið um kirkjugarð úti á Bakka tað, sum ráðgevararnir hjá kommununi hildu vera best egnað. Tað var eisini tað, ið gjørt varð mest burtur. Onnur uppskot vóru í tveimum umførum at útbyggja verandi kirkjugarðsøki, gera nýggjan kirkjugarð norður móti Línurðum, á Giljatrøðni, í Steigabønum.

### Kirkjugarður sum frístaður

Talan er um at gera ein kirkjugarð niðan frá verandi vegi, sum skal breiðkast og førast runt nýggja kirkjugarðin og bindast í aftur vegin í Heygagerði. Gerast skulu gøtur úr vegnum inn í kirkjugarðin, og fyllast skal út við mold í fløttar. Millum fløttarnar verða gjørdar skráar, har plantað verður í.

Lagt varð upp til at gera kirkjugarðin soleiðis, at hann samstundis kann gerast eitt frístað hjá fólki at koma til. Hugsað verður um, at økið sum er, verður nógv brúkt av fólki, sum gongur túrar út eftir vegnum. Í uppskotinum eru eisini 45 parkeringspláss, eins og bygningur til amboð, starvsfólk og onnur, ið hava ørindi á staðnum.

Ein av fyrimununum við at gera kirkjugarðin úti á Bakka er, at afturat teimum umleið 500 gravstøðunum, sum lagt verður út við, er góður møguleiki fyri útbygging, tá brúk verður fyri tí.

Kostnaðarmetingin var 7,5 milliónir, sum fólk ikki tóktust halda vera serliga nógv.